**Klaksvíkar Ítróttarfelag**
**Stovnað: 24.08.1904**
**FO-700 Klaksvík**
**Tlf. 456184/456167**
**Formaður:** Gestur Hovgaard

**Meistarar (17):** 1942, 1945, 1952, 1953, 1954, 1956, 1957, 1958, 1961, 1966, 1967, 1968, 1969, 1970, 1972, 1991, 1999
**Steypavinnarar (5):** 1966, 1967, 1990, 1994, 1999
**Greipuvinnarar (3):** 1966, 1967, 1999
**Í 1. Deild (60 ár):** 1942-43, 1945-
**Í Europa (6):** Meistarakapping 1992/93, 2000/2001, Steypavinnarar 1995/96, UEFA Cup 1997/98, 1999/2000, 2002/2003

# KÍ byrjar aftur av nýggjum

**Ein einaferð skulu klaksvíkingar byggja eitt nýtt lið upp, men hetta hava teir megnað so ofta, at áskoðararnir kortini ikki tykjast hava nakra orsøk til ótta hesum viðvíkjandi**

Jákup Mørk



*Ove Nysted kann spæla bæði í verjuni og álopinum.*

Mynd: Álvur Haraldsen

Av mongum verður Klaksvíkin roknað sum staðið í Føroyum, har flestu fótbóltstalentini verða klakt. Verandi flaggskipini í so máta eru í løtuni Todi Jónsson og Jákup Mikkelsen, sum báðir hava verið partur av útlendskum meistaraheitum, men sum í løtuni tó hava minni hugaligar tilverur og beinkinum ella somikið langt úti sum á áskoðaraplássunum í teirra feløgum.

Sum so hava úrslitini av mongu evnaríku leikarunum eisini verið sjónlig. KÍ er framvegis tað felagið í Føroyum, sum eigur flestu meistaraheitini, men seinnu árini hevur tó ein kanska ikki heilt so hugalig gongd tikið seg upp í fótbóltslívinum í Klaksvík. Tað tykist nevnliga, sum um KÍ onkursvegna hevur fingið støðuna sum eitt slag klekingardepli. Eitt felag, sum gaman í alir hópatals evnaríkar leikarar, men sum ofta má lata sær lynd, at fuglarnir flúgva úr reiðrinum, so skjótt sum hesir eru nøkunlunda floygdir.

Hetta hevur eisini givið úrslit í, at Klaksvíkin hevur átt sín stóra lut í nógvum av fleiri av meistaraheitunum, sum onnur feløg hava vunnið seinnu árini, tá klaksvíkingar hava spælt við avbygdaføløgum. Og eftir at KÍ í seinnu kappingarhálvu í fjør var kanska sterkasta liðið í kappingini, eru aftur fleiri fráfall at síggja nú í vár. Heðin á Lakjuni og Allan Mørkøre eru farnir til B36, Kurt Mørkøre er fluttur aftur til Noregs, meðan Meinhardt Jonesen ikki longur er í málinum. Allir leikarar, sum í nógvar mátar vóru berandi í fjør, og tað merkir so aftur, at KÍ enn einaferð skal seta við.

Og aftur í ár verður tað ein lokalur venjari, sum fær hesa uppgávuna. Eftir nakað av byrjunartrupulleikum sýndi gongdin í fjør, at Kurt Mørkøre hevði stak gott hegni sum venjari, og ivaleyst hevur hetta viðvirkað til, at felagið í vetur tordi at endurtaka avgerðina um leikandi venjara. Hesa ferð við Jan Joensen við stýrisvølin.

Og uppgávan hjá Jan verður í nógvar mátar lík teirri, sum fleiri av undanmonnum hansara havt havt seinnu árini. Leikarar sum Erling Fles, Símun Joensen og Karsten Joensen munnu allir teljast millum slíkar, sum í framtíðini kunnu bera KÍ, og so er uppgávan at forma framtíðina soleiðis, at hon er ítøkilig. Tað vil siga, at ungu leikararnir sum so ikki fáa nakran serligan frið til eina spakuliga menning. Tvørtur ímóti verða teir tveittir beint fyri leyvurnar, tí áskoðararnir í Klaksvík eru kræsnir. Tey vilja hava sigrar til sítt felag, og tó at hetta kann tykjast ræðandi fyri óroyndar leikarar, so hava klaksvíkingar ikki nakra søguliga orsøk at óttast. Ferð eftir ferð hava teir upp á rekord-tíð bygt eitt nýtt lið upp. Eitt lið, sum enn einaferð kann takast við tey sterkastu í dystinum um heiðursmerki.

## Leikarahópur

Tølini, sum eru viðmerkt, siga, hvussu nógvar dystir/mál leikarin spældi/gjørdi fyri felagið í 2002, og hvussu nógv (gul-reyð) kort leikarin hevur fingið í sama tíðarskeiði.

| Navn | Í fjør | Landsdystir | Áður spælt við |
|---|---|---|---|
| **Málverjar** | | | |
| Karstin Joensen | | | LÍF |
| Óli Poulsen | | | |
| John William Joensen | | | |
| **Verja** | | | |
| Jan Andreasen | 9/0 (1-0) | | |
| Rúni Elttør | 14/0 (1-0) | | |
| Atli Danielsen | 17/1 (2-0) | | |
| Aleksandar Djordjevic (JUG) | 17/0 (2-0) | | |
| Frank Joensen | | | |
| Sámal Eyðfinn Poulsen | | | |
| Kristian Andreasen | | | |
| **Miðvøllur** | | | |
| Allan Joensen | 15/0 (4-0) | 7/0 | |
| Fríðin Ziskason | | | B68 |
| Símun Joensen | 5/1 (1-0) | | |
| Harley Bertholdsen | 17/5 (0-0) | 5/0 | |
| Arnold Joensen | | | B68 |
| Eyðun Klakstein | | | ÍF |
| Jan Joensen | 17/1 (4-0) | | |

| Navn | Í fjør | Landsdystir | Áður spælt við |
|---|---|---|---|
| **Álop** | | | |
| Ove Nysted | 15/5 (3-0) | | |
| Hjalgrím Elttør | 18/11 (2-0) | 4/0 | |
| Erling Fles | 12/2 (1-0) | | |
| Leon Bjartalíð | | | |
| **Tilgongd** | | | |
| Arnold Joensen | 17/4 (1-1) | B68 | |
| Fríðin Ziskason | 12/1 (1-2) | B68 | |
| **Frágongd** | | | |
| Allan Mørkøre | 17/2 (0-0) | B36 | |
| Heðin á Lakjuni | 11/8 (1-0) | B36 | |
| Meinhardt Joensen (m) | 18/-25 (1-0) | Uttanlands | |
| Kurt Mørkøre | 14/8 (4-0) | Uttanlands | |
| Bárður á Lakjuni | 10/0 (0-0) | GÍ | |
| Bjarte Vattelstad | 7/1 (1-0) | Uttanlands | |
| **Venjari** | | | |
| Jan Joensen | | | |



# Vit skulu nýta okkara egnu

**Tað er ótrúliga kostnaðarmikið at reka eitt fótbóltsfelag, og tí heldur KÍ-formaðurin, at felagið fyrst og fremst eigur at satsa upp á stóra potentialið, sum býr í felagnum**

Jákup Mørk



*– Sjálvandi skulu vit royna at halda fast í okkara leikarum, so teir ikki fara aðrastaðni. Men vit mugu samstundis ásanna, at tað ikki altíð er gjørligt, sigur Gestur Hovgaard, formaður í KÍ.*

Mynd: Jens Kristian Vang

Tað vóru mong, sum hugdu eitt sindur skeivt, tá KÍ fyri knøppum ári síðani skifti formann. Ikki tí at formansskiftið í sjálvum sær var nakað óvanligt, men heldur at talan í fótbóltshøpi var um eitt rættiliga nýtt andlit. Gestur Hovgaard, sum upprunaliga er suðuroyingur, varð valdur til formann, og tó at hann fyri mong var eitt feskt navn í fótbóltshøpi, so heldur Gestur ikki sjálvur, at hetta var eitt lop í nakran ókendan heim.

– Fyrst og fremst, so hevði eg longu tá havt nakað at gera við KÍ. Í eini tvey ár hevði eg hjálpt til við ymsum lutum í felagnum, so heilt ókunnugur var eg ikki. Og so haldi eg eisini at mín fakliga bakgrund innan samskipan og organisatión kann vera ein styrki í styrki í so máta. Ikki tí KÍ er serliga óorganiserað, men í einum somikið kompleksum bygnaði, er neyv samskipan oftani neyðug.

Og seinasta árið er tað eisini júst hesum, sum nevndin í felagnum hevur arbeitt serliga nógv ið, sigur Gestur.

– Fyrst og fremst, so hava vit roynt at lagt so nógvar uppgávur sum gjørligt á so nógvar herðar sum gjørligt. Hetta tí vit á tann hátt hava bestan møguleika at fáa tingini gjørd.

– Hartil hava vit so eisini sett eina blanding av einum dagligum leiðara og ungdómsvenjara í Bill McLeod Jacobsen fyri at styrkja um organisatiónina. Hetta hongur eisini saman við, at krøvini til eitt fótbóltsfelag verða alsamt økt. Nýggju UEFA-krøvini eru t.d. gjørd til professionellar fyritøkur, men fyri tað mugu vit eisini lúka hesi, og tað eru so avgjørt krøv, sum vit ætla okkum at lúka, sigur formaðurin.

### Klekingardepil

Eitt er, at fáa KÍ at rigga innanhýsis, soleiðis at fótbóltur, hondbóltur og ítróttarhøll øll kunnu fáast at rigga. Nakað annað – og tað er tað týdningarmesta fyri uttanfyristandandi – er, hvussu hetta kann síggjast aftur í úrslitunum á vøllinum.

Her hevur KÍ altíð verið við í fremstu røð, og tó at tað ofta hevur verið nakað langt ímillum snapsirnar, so er KÍ framvegis mest vinnandi føroyska fótbóltsfelagið, tá tosað verður um fyrstudeildarfótbólt.

Ein trupulleika, sum KÍ hevur drigist við seinnu árini er tó, at felagið ofta hevur havt stóra frágongd av leikarum. Ikki tí hesir gevast, men heldur tí teir vilja royna fótbóltsevnini aðrastaðni.

Um hetta heldur Gestur Hovgaard, at tað sjálvandi er harmiligt, tá leikarar fella burturfrá, men hinvegin ásannar hann, at hetta er gongdin í fótbóltinum.

– Serliga tá tað eru kappingarneytarnir, sum fara avstað við monnunum, er tað keðiligt. Tað eru jú leikarar, sum vit hava uppalt. Men hinvegin kunnu vit illa loyva okkum at standa sum forðing fyri leikarum okkara. Er talan um útlendsk feløg, er støðan sjálvandi ein onnur, men tosar tú um føroysk feløg, so mugu vit eisini ásanna, at hetta er gongdin í samfelagnum. Ikki minst tá so stórur partur av arbeiðs- og útbúgvingartilboðunum er í Havn.

### Fer at broytast

Í dagliga yrki sínum er Gestur annars leiðari á granskingardeplinum í Klaksvík. Spurdur, um hann ikki her kundi gjørt okkurt til at betra um umstøðurnar hjá KÍ, svarar hann flennandi, at hetta jú er hvør sítt. Men hann dylur ikki fyri, tingini í ávísan mun hanga saman.

– Eitt felag sum KÍ er sjálvandi eisini tengt at samfelagnum. Og tað er einki at ivast í, at støðan hjá felagnum kann gerast øðrvísi, tá eitt nú undirsjóvartunnilin kemur. Akkurát hvussu tað fer at ávirka, er ilt at siga, men tað verður í øllum førum talan um broytingar, heldur hann.

Men fram til tá, so mugu tey í Klaksvík í nógvar mátar taka til takkar við at vera klekingardepil hjá leikarum.

– Sjálvandi skulu vit royna at halda fast í okkara leikarum, so teir ikki fara aðrastaðni. Men vit mugu samstundis ásanna, at tað ikki altíð er gjørligt. Samstundis kostar tað ótrúliga nógv, um tú alla tíðina skalt leita styrk aðrastaðni frá, og tí er okkara politikkur nú, at vit fyrst og fremst skulu nýta okkara egna fólk, og felagið hevur eisini potentialið til hetta. Skulu leikarar aðra staðni frá takast inn, skulu hetta í øllum førum verða slíkir, sum veruliga kunnu styrkja liðið.

Um hetta so er nóg mikið hjá áskoðarunum, er so ein annar spurningur. Vanliga eru teir sera kræsnir, og góðtaka ikki annað enn bert sigrar til seg og síni. Men hinvegin er heldur einki at ivast í, at gleðin um evnini til framhaldandi at ala nýggj fótbóltsstórmenni eisini er stór. Og kanska tað eisini kann kennast sum troyst, tá úrslitið ikki er gylt á hvørjum ári.